# Fráboðan um várið

## Torradagar er heitið á øðrvisi mentanarvikuni í Klaksvík hesa vikuna



Randi Jacobsen

Fyri fimtu ferð skipar mentanardeildin hjá Klaksvíkar kommunu fyri torradøgum. Hetta er ein mentanarvika við mentan í breiðari merking.

Svimjihøllin hevur ymisk tiltøk, framsýning letur upp í morgin á Húsarhaldsskúla Føroya, fyrilestur á Bókasavninum um týdningin av at hava Íverksetarahús, Dragin hevur opið skip mikudagin, og mikukvøldið fr Alberrt Isfeld, arkitektur at halda fyrilestur á Bókasavninum týdningin hjá havnaløgum.

Hósvøldið fer Johnny í Grótinum, óløguleiðari í BankNordik í á Bókasavninum at hugleiða um aldurbýti og tørvin á pensjónsskipanum.

A fundi í Spaniastovu hóskvøldið fer Jógvan Ravnsfjall, formaður í gøtunavnanevndini at greiða frá arbeiðinum at geva gøtum í Klaksvík nøvn, og hann leggur upp til orðaskifti um, hvussu býlingsnøvnini kunnu varðveitast.

### Upplýsing um ALS

Fyrrapartin fríggjadagin er Húsið opið fyri ungum arbeiðsleysum fólkum, sum Arbeiðsloysisskipanin við hesum tiltakinum vil rætta eina hjálpandi hond.

Greitt verður frá øllum møguleikunum, sum eru í skipanini fyri ung. Avbjóðingin er ikki at missa mótið. Skipanin hevur eitt nú ein lestrarvegleiðara, møguleikar eru fyri at sleppa á skeið o.a.

Fríggjakvøldið hevur danska strúkikvartettin Nightingale String Quartet konsert í Skúlanum við Ósánna, og hetta kvøldið verður eisini sangløta í Betesda.

Leygarmorgunin verður matiné í Christianskirkjuni.

### Heilsa

Leygardagin setir Auðunn Konráðsson, formaður í heilsu- og umhvørvisnevndini torraheilsurenningina í gongd, og tá verður heilsukafé á sjúkrahúsinum. Har verður høvi at máta blóðtrýst, blóðsukur, BMW og gera eina konditest. Fólk kunnu tekna seg tl blóðgevar og eisini ber til at bílegja tíð til lungnafunksjónskanning.

### Hugnakvøld

Leygarkvøldið verður hugnakvøld í Skálanum við borðhaldi, felagssangi og onkrum stuttligum hugleiðingum um sjómanslívið.

Aftaná verður farið upp á gólv at kvøða millum annað Vagen og Brótatátt.

Uni, Lív og Tróndur fara leygarkvøldið at spæla frískan blues- og fólkatónleik í Leikalund.

### Niðan á Lokkan

Sunnudagin ger Norðoya Gongufelag ein drúgvan gongutúr, og ætlanin er at fara niðan á 754 metra høga lokkan. Um ikki hevur regnað illa dagarnar frammanundan, er ikki so tungt at koma niðan, og omaná er slætt, sigur Dávur Winther. Staðkend fólk verða við.

Torri stavar frá tí gomlu tíðarrokningini, har hetta var navnið á mánaði, sum byrjaði fyrstu tendring eftir jól og vardi fram til næstu tendring.

### Torri

Útróðrarmenn tosa um torrafisk og torraleiðir í hesum døgum, tí fiskurin kemur longur inn á grunnin at gýta. Hesa tíðina er fiskurin væl fyri og hevur rogn.

- Torradagarnir, sum eru 14. – 20. februar í Klaksvík, er eitt kærkomið tiltak, nú vit eru farin at leingjast eftir várinum og summarinum,

---

# Nýggj politistøð

## Vaktleiðarin á politistøðini í Havn situr nú í eini bingju í garðinum

Randi Jacobsen

Orsakað av blámusoppi verður neyðugt at umvæla alla politistøðina í Havn umframt varðhaldið, og tí má alt virksemi flytast í onnur høli.

Summi starvsfólk eru flutt til Runavíkar, onnur halda nú til Yviri við Strond, og um vikuskiftið átti vaktleiðarin tørn at flyta.

Fleiri ymisk støð hava verið nevnt sum møguleikar at leiga til vaktleiðaran, men fyribilsloysnin var ein bingja, sum poliiitð hevur leigað frá einum byggifelag og sett í garðin.

Vaktleiðarin situr við telefonina og hevur ein politist aftrat sær. Tey bæði sita við telefonirnar, íroknað alarmsentralin og aðrar alarmar.




*Tá ið fyribilsætlanin varð tikin í nýtslu, høvdu onkur starvsfólk sett upp skelti á bingjuna sipandi til primitivu loysnina*